# Leguhúsið í Nesvík útbyggjast




**Ein arbeiðsbólkur er settur til at arbeiða við ætlanini um at útbyggja leguhúsið. Næsta byggistigið verður ikki eftir upprunaligu ætlanini**

HEIMAMISSIÓNIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Leguhúsið í Nesvík skal útbyggjast. Til tær stóru legurnar um summarið er húsið í so lítið*

Leguhúsið í Nesvík skal útbyggjast. Ein arbeiðsbólkur er settur til ítøkiliga at arbeiða við útbyggingini. Vagn Foldbo, aðalskrivari hjá Heimamissiónini, sigur, at tað ikki verður bygt eftir upprunaligu ætlanini. – Í tí ætlanini er svimjihøll og fimleikahøll. Tað, sum vit hava brúk fyri, er ein forsamlinghøll, nøkur eyka seingjapláss og høli til umsiting, sigur hann.

Leguhúsið í Nesvík er upptikið mestsum hvørt vikuskifti. Tað eru barnalegur, seturskúlar, bygdalegur, brúdleyp og annað. Um summarið er mest virksemi, tí at tá eru legurnar. Leguhúsið í Nesvík hoyrir til tí føroysku Heimamissiónina, og verður tað nýtt av øllum greinunum í Heimamissiónini. Tað eru 21 fólk í starvi hjá Heimamissiónini.

Jákup Kass var formaður í bygginevndini, sum á sinni stóð fyri arbeiðinum at fáa leguhúsið bygt. Hann heldur, at leguhúsið hevur havt sera stóran týdning fyri Heimamissiónina, síðani tað varð vígt í 1993.

Spurdur, hví teir valdu at byggja húsið í Nesvík, svarar Jákup, at teir høvdu tørv á einum staði, sum lá mitt í landinum. Heimamissiónin er landsfevnandi, og virksemið í leguhúsinum er primert landsfevnandi, so fólk úr øllum landinum máttu hava lætt at ferðast til leguhúsið.

Vagn foldbo sigur, at økið við streymin liggur sum ein miðdepil í Føroyum, og tí varð húsið bygt í Nesvík. Onnur øki vórðu eisini umrødd, millum onnur Saksurnardalur, men Nesvík varð valt. – Hetta er eitt sentralt pláss, samstundis sum tað er eitt sindur avsíðis, so tað er sera vælegnað til legur og annað, sigur Vagn Foldbo.

## Landsstevna hjá sjómanskvinnuringunum

Í vikuskiftinum høvdu sjómanskvinnuringarnir landsstevnu í Nesvík. Lansstevnan verðir hildin einaferð um árið. Um 2oo fólk luttøku. Lansnevndin fyri sjómanskvinnuringunum skipaði fyri. Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, sigur, at tey eru sera vælnøgd við tiltakið. Ringa veðrið forðaði teimum í at fara út til tey uttandura tiltøkini, sum vóru á skránni, men fólk hugnaðu sær kortini inni. Leygardagin varð tosað um arbeiðið, har tey lokalu høvdu møguleika at greiða frá sínum arbeiði.

**HK**



*Hesar eldru damurnar hugnaðu sær ófórt á landsstevnuni hjá sjómanskvinnuringunum*

# Bátastevna í ódnarveðri

**Teir knappliga 70 bátarnir sum vóru komnir til Vestmanna á Bátastevna, løgdu nógv fyri, fyri at koma fram. Teir fingu tó ein sera góða stevnu, men sluppu ikki avstað aftur fyri veður**

BÁTASTEVNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Veðrið leikaði í í Vestmanna leygarkvøldið. Kortini vóru ikki minni enn sjeyti bátar, sum luttóku á bátastevnuni, sum VÍF skipaði fyri. – Tá so nógvir bátar leita til Vestmanna í so ringum veðrið, so kunnu vit ikki vera annað enn sera væl nøgd, sigur Jónfinn Egilsnes, høvuðsfyrireikari av bátastevnuni.

Í samband við stevnuna, høvdu fyrireikararnir lagt bátabrúgvar út frá keiini í hylinum, har trolararnir plaga at liggja. – Allar brúgvarnar, uttan ein, sum vit hava lænt frá Kvívíks Kommunu, hava ligið á Sørvágsfirði, og tær hava vit so riggað til, soleiðis at vit kundu brúka tær til bátastevnuna, greiðir Jónfinn Egilsnes frá.

### Grillkvøld undir fiskakassum

Komin á land bjóðaði VÍF luttakarunum suppu, og eisini var ein øl við eini serligari bátastevnu etikett at fáa. Men tað var ikki bert suppa at fáa í Vestmanna hetta leygarkvøldið, tí á havnalagnum varð skipað fyri grillkvøldi í øllum ódnarveðrinum. Tað vóru dreingir 14 ár hjá VÍF, sum skipaðu fyri hesum, og teir høvdu riggað seg til við fiskakassum, soleiðis at lívd fekst fyri vindinum og regninum. Og saman við góðum harmonikutónum syrgdu teir fyri, at ongin nýttist at vera svangur til bátastevnuna.

Uppi í høllini var eisini ymisk tiltøk á skránni. Har var tað gentur 14 ár sum skipaðu fyri. Aftrat øllum teim vanligu stevnuaktivitetunum, skipaðu tær fyri eini kastikapping. Tær høvdu fingið hendir á einum tóli, sum máldi hvussu hart ein megnaði at kasta, og var hetta eitt sera vælumtókt tiltak.



*Hvørki bátar ella húsvognar sluppu avstað aftur av Bátastevnuni í vikuskiftinum*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

### Sluppu ikki avstað aftur

Tá tað leið út á kvøldið og náttin kom, varð skipað fyri dansi í høllini, og har var dansa bæði væl og longi. Men tá stevnuluttakararnir sunnudagin ætlaðu sær heimaftur, varð tað av ongum. Veðrið var tá vorðið so mikið ringt, at tað var ikki hugsingur um, at fara avstað aftur við báti. Heldur ikki teir 20 húsvognarnir, sum vóru við á stevnuni, hættaðu sær avstað aftur.

– Hetta er fyrsta ferðin, at bátarnir ikki eru slopnir av aftur bátastevnuni, so í so máta var henda stevnan søgulig, heldur Jónfinn Egilsnes skemtandi fyri at enda.